# Nuuk meldað DR

Kommunan í Nuuk hevur meldað Danmarks Radio til løgregluna í sambandi við sjónvarpssendingina "Flugten fra Grønland". Kommunan fýlist á, at sjónvarpið vísti andlitið á einum starvsfólki á sosialu umsitingini hjá kommununi, og at sjónvarpið vísti eina nakna smágentu. Ein talskvinna hjá kommununi sigur, at tað er ábyrgdarleyst av DR at vísa myndir av einari naknari smágentu, tá hugsað verður um, hvussu mong børn eru fyri kynsligum ágangi.



# Ferjur avlýsa fyri veður

Norska veðurtænastan hevur sagt frá nógvum vindi og ringum sjógvi við aldum upp í 11 metra hædd í Norðsjónum. Tað hevur fingið nøkur av oljufeløgunum at taka fólk av oljupallunum á Valhall- og Ekofisk-leiðunum, og í gjár gjørdi DFDS av at avlýsa ta vanligu rutuna millum Bergen og Ongland og rutuna millum Stavanger og Ongland. Fjordline, sum rekur rutu millum Bergen og Danmark, umhugsaði í morgun at avlýsa sína rutu.



*Kommunan hevur skorið talið av búfólkum niður í átta, og tí er sambært Steinbirni Jacobsen ikki brúk fyri loftinum, og harvið heldur ikki fyri »neyðútgongdini«*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

# Eingin loysn í bræði

**– Eg skal ikki tveita ábyrgdina frá mær, men eg kann tíverri ikki lova nakra loysn her og nú, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, um trygdina á sambýlinum í Bøgøtu**

ELDRATRYGD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

– Eg kenni væl til hatta málið við sambýlinum í Bøgøtu, og eg kann bara siga, at vit arbeiða við málinum.

Tað sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Hann sigur, at loysnin við sethúsunum í Bøgøtu alla tíðina skuldi verið ein fyribils loysn, sum tíverri er toygd alt ov langt út.

– Trupulleikin uppstendur, tá loftið verður nýtt, tað er tá, at hesin góði togendi kemur inn í myndina. Men vit hava skorið talið niður á átta búfólk, júst fyri at sleppa undan at nýta loftið, sigur borgarstjórin í Klaksvík.

Hann viðgongur, at viðurskiftini og umstøðurnar í leigaðu húsunum langt frá eru fullkomnar, og stóð tað upp til hann var tað betur, um sambýlið bleiv latið aftur.

– Men sum støðan er, ber tað ikki til. Vit vóna at fáa eina frægari loysn enn hana, sum er í løtuni, men tað er ein spurningum um, at leigarin vil gera íløgur í húsini, tá talan bert er um stutta leigutíð aftrat, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Hann fegnast hinvegin um, at tað nú hóast alt er komið so væl áleiðis við ætlanini at byggja eldrabýli á Viðareiði, at tilboðini verða latin upp hesa vikuna.

– Talan verður um eitt býli við plássi til 24 búfólk, og tað tekur nógv av trýstinum á eldraøkinum, sigur Steinbjørn Jacobsen.

### Vóna at lata aftur

Borgarstjórin er sostatt ikki nøgdur við støðuna, sum hon nú er, men hann sigur eisini, at júst eldraøkið er eitt flókt øki. Tí tá tað kemur til sambýlir, hevur kommunan ábyrgd av bygningunum, meðan landið hevur ábyrgd av røktini av teimum eldru.



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, er ikki nøgdur við støðuna á sambýlinum í Bøgøtu, men kann ikki lova nakra loysn á málinum her og nú*

*Savnsmynd*

Elspa Lützen er leiðari fyri norðoyaøkinum hjá nærverkinum, og hon situr eisini í bygginevndini fyri nýggja eldrabýlið á Viðareiði.

– Í løtuni eru eini 70 á bíðilista, men tað er samlaða talið. Langt frá øll hava bráfangis tørv. Eg rokni við, at tá eldrabýlið á Viðareiði letur upp, vónandi í januar mánað 2009, kunnu tey átta búfólkini á sambýlinum í Bøgøtu flyta inn har, umframt 16 onnur. Tá skuldi bráfangis tørvurin gjarna verið nøktaður, og sambýlið í Bøgøtu vónandi verið latið aftur, sigur Elspa Lützen.

Annars eru fleiri onnur búpláss til eldri í býnum. Á eldrabýlinum á Heygum búgva 16 fólk, á Røktarheiminum eru 36 og á Vistarheiminum er pláss fyri 10 búfólkum.

Men eldraøkið er framvegis eitt mál, sum er býtt millum land og kommunur, og spurningurin er, um ein nøktandi skipan kann fáast, so leingi ábyrgdin er tvíbýtt.

# Fara at søkja eftir heilsustarvsfólki í Skotlandi

**– Á heilsuútbúgvingarøkinum kundu Føroyar eisini havt fyrimunir av einum tøttum samstarvi við Skotland, heldur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sum hevur verið á vitjan í Skotlandi fyri at kanna møguleikarnar fyri samstarvi við tað skotska heilsuverkið**

HEILSUPOLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Samskiftið og samstarvið millum føroyska og skotska heilsuverkið hevur verið sera lítið.

– Hetta er undrunavert, tá hugsað verður um, at ein so stórur partur av heilsutænastunum, sum verða veittar føroyingum, verða keyptar uttanlands, heldur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður.

Heilsutænastan verður veitt, antin við at sjúklingar verða sendir av landinum, ella við at heilsustarvsfólk koma til Føroyar.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður var í døgunum 16. og 17. oktober á vitjan í Skotlandi fyri at kanna møguleikarnar fyri samstarvi við tað skotska heilsuverkið.

Í Edinburgh hitti landsstýrismaðurin skotska heilsumálaráðharran, Nicolu Sturgeon, sum var sera positiv fyri einum samstarvi við tað føroyska heilsuverkið.

Skotar hava síðani 1999 havt fulla politiska umsiting av heilsuverkinum innan fyri karmarnar av skotsku sjálvstýrislóginí. Samanborið við England, hevur Skotland ført ein rættuliga øðrvísi heilsupolitik. Tannenski politikkurin er nógv grundaður á kapping og frítt val, eins og í Danmark og fleiri øðrum londum. Í Skotlandi hava tey ikki lagt dent á hetta, men heldur á netverk, samstarv og eina meiri líka atgongd til heilsutænastur.

Landsstýrismaðurin vitjaði eisini í Aberdeen, har hann m.a. sá bráðmóttøkuna á meginsjúkrahúsinum Aberdeen Royal Infirmery. Hetta sjúkrahúsið veitir tænastu til Hetland, Orknoyggjar og Suðuroyggjar og hevur eina sera framkomna telemedisinska tænastu. Kannað verður nú, um føroyingar kundu havt fyrimun av einum skipaðum samstarvi við hetta meginsjúkrahúsið. Flogtíðin til Aberdeen er einans helvtina av tíðini at flúgva til Danmarkar, og kann hetta í ávísum førum verða avgerandi fyri akuttari læknahjálp.

– Á heilsuútbúgvingarøkinum kundu Føroyar eisini havt fyrimunir av einum tøttum samstarvi við Skotland. Hetta er galdandi fyri grundútbúgvingar, víðari útbúgvingar umframt eftirútbúgvingar. Nógv fólk aðrastaðni frá ynskja at lesa á teimum hægru lærustovnunum í Skotlandi, og landið útbúgvir fleiri heilsustarvsfólk, enn tey sjálv hava tørv á, heldur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur, at sum heild er ikki mangul upp á heilsustarvsfólk í Skotlandi, og møguliga kundu heilsustarvsfólk úr Skotlandi havt áhuga at starvast í Føroyum. Ætlanin er í næstum at royna at søkja eftir heilsustarvsfólk úr Skotlandi.

Sum heild var ferðin til Skotland sera gevandi og eitt gott grundarlag fyri eini framhaldandi fyrireiking av einum tøttum samstarvi við grannalandið fyri sunnan, sigur landsstýrismaðurin.